

*150 milliónir um árið á hvørjum ári verða ferðsluvanlukkurnar í Føroyum mettar at kosta samfelagnum*
*Savnsmynd*

# Ferðsluvanlukkur kostað 1,5 milliard kr. síðani 1992

**Á vegunum í Føroyum eru 39 fólk deyð seinastu 10 árini. Mett verður, at eini 1000 hava fingið skaða, og av hesum um 100, sum hava fingið varðandi mein. Í pengum er talan um stóran miss**

FERÐSLA
*Turið Kjølbro*

Menniskjansligi missurin, hvørja ferð eitt fólk letur lív ella kemur álvarsliga til skaða í ferðsluni, er ómetaliga trupul at gera upp. Í sorg, sakni, mistari vælferð og mistum liviárum, beinleiðis og óbeinleiðis. Norðmenn hava gjørt ein frymil, ið roknar peningaliga missin fyri samfelagið og einstaklingin, fyri hvørt andlát og hvønn løst í ferðsluni. Frymilin byggir á ymiskar faktorar, eitt nú hvussu nógv bilurin kostar, hvat tryggingin tekur við, hvussu nógv innlegging og viðgerð av sjúklingi kostar, mist liviár verða eisini roknað við og vælferðartap. Vælferðartap merkir tap av luttøku í virksemi, tú annars hevði tikið lut í, hevði tú ikki komið út fyri ferðsluvanlukku, umframt annað vanlukkan hevur havt við sær.

Nýta vit norska frymilin til føroysk viðurskifti, kunnu vit við fyrivarni gera okkum eina hóming av, hvat ferðsluvanlukkur kosta føroyska samfelagnum. Í Føroyum eru seinastu 10 árini 39 fólk deyð, 1000 fólk hava fingið skaða, av hesum um 100, sum hava fingið varðandi mein. Í tíðarskeiðinum hava verið omanfyri 12.000 ferðsluóhapp!

Á hesum grundarlagi koma vit fram til, at ferðsluvanlukkur og ferðsluóhapp hava kostað føroyska samfelagnum 1,5 milliard krónur seinastu 10 árini, ella 150 milliónir um árið.

- Fyrr enn ferðsluvanlukkur verða roknaðar um til pengar, og harvið mistar pengar, skilja politikarar og myndugleikar ikki týdningin av, hvussu umráðandi tað er at gera ferðsluna tryggari, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Skulu vit betra um ferðslutrygdina, so má peningur setast av til neyðugu tiltøkini. Men bera vit hesar útreiðslur saman við tær sparingar, sum færri ferðsluóhapp og vanlukkur hava við sær, er í veruleikanum talan um sparing.



*- Gera vit røttu íløgurnar í nóg stóran mun, eri eg sannførdur um, at talið á deyðum og skaddum í ferðsluni minkar munandi, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd*

- Gera vit røttu íløgurnar í nóg stóran mun, eri eg sannførdur um, at talið á deyðum og skaddum í ferðsluni minkar munandi. Sjálvsagt kann alt ikki gerast eftir einum ári, men í veruleikanum eru vit ikki so langt frá málinum. At forða fyri, at eini 14-15 fólk um árið ikki fáa álvarsligan løst í ferðsluni, eigur at bera til, sigur Jón Kragesteen.

### Trygdin batnað

Hóast Føroyar eru í skeiva endanum í mun til hini Norðurlondini, tá ið ræður um deyð og skadd í ferðsluni, er ferðslutrygdin í dag nógv betri, enn fyri fáum árum síðani. At tað varð lógarkravt at nýta bilbelti, hevur heilt greitt gjørt sítt til, at færri fólk lata lív í ferðsluni í mun til fyri ikki so nógvum árum síðani, umframt at bilarnir eru betri og sterkari.

- Sum heild er framgongdin stór. Í mun til hini Norðurlondini hevur Danmark verið verri fyri enn Føroyar, men seinasta árið eru viðurskiftini batnað nógv í Danmark. Ein orsøkin til tað er, at nógv hevur verið gjørt fyri at fáa fleiri fólk at nýta bilbelti. Samstundis kann sigast, at tað gongur ikki nóg væl í Føroyum at fáa fólk at brúka bilbelti. Vit kunnu í øllum førum ásanna, at í flestu av vanlukkunum, har fólk eru deyð seinastu árini, er bilbelti ikki brúkt. T.d. ber til at siga, at sannlíkindini fyri, at tey trý, sum mistu lívið í stóru vanlukkuni á Lambareiði síðsta ár, høvdu yvirlivað, høvdu verið væl betri, um tey høvdu brúkt bilbelti, tí bilurin var stórt sæð heilur. Hví fólk hava ilt við at brúka bilbelti, er ringt at meta um. Stórur partur av ferðsluvanlukkunum, sum henda, er í sambandi við, at unglingar stytta sær stundir. Tí hví annars seta seg í ein bil á náttartíð? At taka bilbelti uppá er ikki tað, tey ungu fyrst hugsa um, tá ið tey seta seg í bilin og vilja bróta út og verða cool. Eg ímyndi mær, at tey hugsa, at tað er at vísa veikleika.

### Ferðslufellur

Leiðarin á Ráðnum fyri Ferðslutrygd ásannar, at uppgávan at vísa á sokallaðar ferðslufellur í bygd, bý og óbygd, ikki verður raðfest so høgt sum hon átti á stovninum, av teirri einføldu orsøk, at stovnurin ikki hevur orku og sakkunnleika til tess.

- Vit vísa í førum myndugleikarnar á ferðslufellur, heita á teir um at gera eitthvørt, men á stovninum hava vit ikki teknikarar og sakkunnleikan, sum skal til fyri at meta um slíkt. Í Føroyum hava vit ikki havt sum tradisjón at traðka fram í so máta, hóast eg vildi ynskt, at vit vóru meiri sjónlig og vakin, sum eitt brúkarafelag til dømis. Í førum, tá ið vit hava víst á ferðslufellur, hevur tað verið tikið illa upp av teimum, sum eiga vegirnar, men eg haldi, at ein broyting er við at henda og at myndugleikar betur tola at hoyra kritikk. Tey, ið gera vegir í dag hava betri hug enn fyrr at taka onnur við uppá ráð enn sína egnu fakligu vitan, tí vit øll ynskja at gera vegirnar tryggar at ferðast á fyri øll. Líknandi stovnar uttanlands, eitt nú í Svøríki, gera nógv burtur úr at vísa á, hvat eigur at verða gjørt, ábøtur og annað í ferðsluni, og tað vísir seg, at týðiligar útmeldingar um ein ella annan ferðslutrupulleika, sum ganga ímóti einum væl etableraðum myndugleika, hava nógv størri ávirkan á fólk enn stórar lýsingarherferðir. Sum stovnur eigur Ráðið fyri Ferðslutrygd at átaka sær hesa uppgávuna meiri enn vit gera, men skulu vit tað, skal tað gerast rætt og við sakkunnleikanum í rygginum, tí mæla vit til broytingar í ferðsluni, skulu tær verða væl gjøgnumhugsaðar. Annars kunnu tær gera ilt verri, sig ur Jón Kragesteen.



# Minnast sunnudagin tey deyðu í ferðsluni

**- Vit vóna, at minningardagurin er við til at broyta ein hugburð til bilar, ferð og ferðslu, sigur Ingi Gunnarsson, stigtakari til minningardagin**

FERÐSLA
*Turið Kjølbro*

Tankin um at velja ein dag um árið sum minningardag teirra deyðu í ferðsluni er gamal, men fyri tveimum árum síðani tóku havnarmaðurin Ingi Gunnarsson og onnur seg saman og gjørdu álvara av. Í samráð við Ráðið fyri Ferðslutrygd varð fyrsti sunnudagur í juli valdur til minningardag. Sunnudagin komandi verður hesin dagur sostatt hildin á triðja sinni. Stigtakararnir við stuðli frá stovnum, eitt nú Ráðnum fyri Ferðslutrygd, leggja hendan dagin blómur á støð, har fólk eru deyð í ferðsluni, og avvarðandi og onnur minnast tey mongu, sum eru farin í ferðsluni í Føroyum. Endamálið er ikki bert at minnast tey mongu farnu, men eisini, at stigtakararnir vilja minna fólk á, at á ávístu støðum hava fólk mist lív í ferðsluni.

- Vit hava valt blómur, tí tað er ein vakur og siðiligur máti at minnast fólk. Høvdu vit ístaðin sett kross ella skelti á støðini, sum stóðu altíð, høvdu tey ikki havt somu ávirkan sum blómur. Blómurnar gera vart við henda einstaka dagin í árinum, tveir-tríggjar dagar seinni eru tær følnaðar, og tiltakið verður tikið upp aftur av nýggjum árið eftir. Tað er tann fyribyrgjandi tankin, sum liggur okkum fremst, og vit vóna, at minningardagurin er við til at broyta ein hugburð, sigur Ingi Gunnarsson.

Síðani 1928 eru 240 fólk farin í ferðsluni í Føroyum, men av ymsum grundum hava stigtakararnir valt at avmarka minningartakið til 1970.

- Grundin er lutvíst, at tað í fleiri førum er trupult at áseta neyvt, hvar fleiri ferðsluvanlukkur áðrenn 1970 hava verið, og lutvíst, tí at peningaupphæddin, vit hava at arbeiða við, er avmarkað. Tey eru eisini mong, sum hava mist heilsuna í ferðsluni, men tey



*Sunnudagin verða blómur lagdar á støð, har fólk eru deyð í ferðsluni*
*Savnsmynd*

hava vit ikki orku til at umfata í minningartiltakinum. Hinvegin vóna vit, at dagurin í sjálvum sær minnir á álvaran í ferðsluni, sigur Ingi Gunnarsson.

Fyri 25 árum síðani kom Ingi Gunnarsson út fyri eini álvarsligari ferðsluvanlukku. Skaðin var stórur bæði á Inga og bil. Hevði hann ikki sitið í trygdarbelti, sum tá ikki var kravt við lóg, er hann sannførdur um, at hann ikki hevði yvirlivað.

# Bilbeltið bjargaði Inga

**Hevði Ingi Gunnarsson ikki sitið í trygdarbelti, hevði hann neyvan yvirlivað álvarsligu ferðsluvanlukkuna, hann var í í 1977.**
**- Síðani havi eg hugsað, at tað er ov lítið, um bara eg havi lært av vanlukkuni, sigur Ingi Gunnarsson, stigtakari til minningardag teirra deyðu í ferðsluni**

FERÐSLA
*Turið Kjølbro*

Ein aprílmorgun í 1977 kom Ingi Gunnarsson úr Havn út fyri eini álvarsligari ferðsluvanlukku. Við nakað av ferð fór hann út av vegnum á veg av Skálafjørðinum til Havnar. Skaðin var stórur bæði á Inga og bil. Hevði hann ikki sitið í trygdarbelti, sum tá ikki var kravt við lóg, er hann sannførdur um, at hann ikki hevði yvirlivað.

- Eg var sjálvur atvoldin til óhappið og havi líka síðani verið ógvuliga glaður um, at eg var einsamallur í bilinum. Og tað er hetta fólk eiga at hugsa um, tá ið tey koyra skjótt, at tey hava ábyrgdina av hinum í bilinum eisini. Hendan vanlukkan leyp ein øgiligan hvøkk í øll rundan um meg, familju og vinir, og sjálvsagt meg sjálvan, sum síðani havi verið noyddur at liva við avleiðingunum og nøkrum avmarkingum orsakað av vanlukkuni. Heilsan hevur ikki verið sum hon var áðrenn óhappið. Eftir vanlukkuna varð eg noyddur at gera eitt umval, tí eg mátti ásanna, at eg ikki longur kundi brúka ta útbúgvingina, eg hevði valt, tí eg nú hevði aðrar fortreytir, sigur Ingi Gunnarsson.

Ferðsluvanlukkan fyri fjórðingsøld síðani hevur gjørt, at Ingi hevur fingið eina heilt aðra fatan til bilar og ferð, enn hann hevði fingið annars.

- Serliga eina tíð eftir vanlukkuna hugsaði eg, at tað var ov lítið, um bara eg hevði lært av vanlukkuni. Tá ið eg sjálvur fekk børn og nú vaksin børn, sum hava fingið koyrikort, havi eg hugsað, at eg havi eina uppgávu at greiða øðrum frá vandum í ferðsluni, og tað er millum annað tí, at eg havi tikið stig til minningardagin. Sjálvur havi eg fortalt mínum børnum frá, hvat eg havi gjørt skeivt og hvør skeivi hugburðurin til koyring er, tí ein dag kann tín skeivi hugburður til bilar og koyring hava við sær, at onnur koma til skaða í ferðsluni. Og tað er tað ringasta, sum kann henda, sigur Ingi Gunnarsson at enda.



*- Ein dag kann tín skeivi hugburður til bilar og koyring hava við sær, at onnur koma til skaða. Og tað er tað ringasta, sum kann henda, sigur Ingi Gunnarsson*
*Mynd: Finnur Justinussen*